| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 27. mai 2010 |
| Býráðsfundur nr. | 06/2010 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2010 tann 27. mai kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 20. mai 2010 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Bjørghild Arnholdtsdóttir
Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari luttók á fundinum, meðan mál nr. 13/2010 varð til viðgerðar.
**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 13/2010.**

**Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2009.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 19. mei 2010 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2009 frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. revisor og Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 19. mei 2010 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2009.

Ein eykajáttan er veitt av býráðnum á kr. 100.000,00, sum er útreiðsluneutral, við tað at flytingin er framd úr bólki 1 til 5. Býráðið hevur á fundi tann 25. juni 2009 endurskoða fíggjarætlanina fyri 2009 og lækka upprunaligu ætlanina vegna fíggjargongdina við kr. 6.237.060,00 ella sløkum 8%. Broytingin er kunnað Fíggjarmálaráðnum við skrivi, dagfestum 26. juni 2009.

Roknskapurin vísir ein fíggingartørv upp á *kr 11.181.195,00 móti kr. 23.541.608,00 Í 2008.*
Sambært høvuðsyvirliti í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdari eykajáttan í árinum:

| | Kontoheiti: | | Roknskapur: | Fíggjarætlan | | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kommunal fyrisiting | | -7.356.985,00 | -6.750.000,00 | | -606.985,00 |
| 2 | Almanna- og heilsumál | | -4.401.647,00 | -4.856.100,00 | | 454.453,00 |
| 3 | Børn og ung | | -8.531.327,00 | -8.032.000,00 | | -499.327,00 |
| 4 | Undirvísing | | -3.262.673,00 | -3.513.000,00 | | 250.327,00 |
| 5 | Mentan og frítíð | | -3.267.673,00 | -3.499.000,00 | | 231.327,00 |
| 6 | Teknisk mál | | -7.039.065,00 | -6.888.000,00 | | -151.065,00 |
| 7 | Kommunal virki | | 276.121,00 | -582.000,00 | | 858.121,00 |
| 1-7 | **Økið 1-7 tilsamans** | | **-33.583.250,00** | **-34.120.000,00** | | **536.750,00** |
| 20 | Rentukostnaður-netto | | -3.280.462,00 | -3.478.000,00 | | 197.538,00 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | | **-36.863.712,00** | **-37.598.000.,00** | | **734.288,00** |
| 1-7 | Íløgur – studning 1-7 | | -16.788.409,00 | -9.990.000,00 | | -6.798.409,00 |
| | **Samanteljing** | | **-53.652.121,00** | **-47.588.000,00** | | **-6.063.925,00** |
| 25 | Avdráttir av lánum | | -5.947.853,00 | -7.392.000,00 | | 1.444.147,00 |
| | **Samanteljing** | | **-59.599.974,00** | **-54.980.000,00** | | **-4.619.974,00** |
| 20 | Skattainntøkur | | 48.418.783,00 | 44.765.140,00 | | 3.653.643,00 |
| | **Fíggjartørvur** | | **-11.181.195,00** | **-10.215.060,00** | | **-966.135,00** |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | Fíggjarbroytingar | | 1.881.195,00 | 973.000,00 | | |
| | Lántøka | | 9.300.000,00 | 9.300.000,00 | | |
| | **Fíggjarúrslit netto** | | **0,00** | **-57.940,00** | | |

Annars eru íløgurnar útgreinaðar á blað síðu 7 í grannskoðaða roknskapinum.

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttan fyri tilsamans kr. 100.000,00 í árinum, og er henda fráboðað Fíggjarmálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 67 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin).

*Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirkar roknskap kommununar fyri 2009. Eykajáttanin er víst niðanfyri.*

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Øki** | **Framd eykajáttan:** | | **Upphædd:** | **Fígging:** | | **Endamál:** |
| | | | | | | |
| 5 | Mentan og frítíð | | -100.000,00 | Økisflytan frá 1 | | Rakstur |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | **-100..000,00** | | | |

Fíggjarnevndin mælir einmæld býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommununnar fyri 2009 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0). Sostatt er grannskoðaði roknskapur kommununar fyri 2009 samtyktur.

**<u>Mál nr. 14/2010.</u>**

**Umsókn frá Eyðuni Matras um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503v í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Eyðuni Matras, Toftagøta 18, 530 Fuglafjørður, dagfest 21. apríl 2010 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503v í Stovugerði 25 í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 18. mai 2010 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

Petur Abrahamsen luttók ikki á fundinum vegna ógjegni.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt var Petur Abrahamsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 15/2010.</u>**

**Umsókn frá Poul Rustin um matstovu-, skeinki- og dansiloyvi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Politinum í Føroyum, dagfest 18. mai 2010 um ummæli býráðsins til umsókn frá Poul Rustin, Í Brekkum 8, 530 Fuglafjørður, dagfest 29. apríl 2010 um matstovu-, skeinki- og dansiloyvi á Restaurant Muntra.

Talan er um virksemi í bygninginum hjá Føroya banka á matr. nr. 494 á Toftavegi 1 í Fuglafirði.

**Avgerð:**
Samtykt at mæla Loyvisnevndini til, at matstovu-, skeinki- og dansiloyvi verður veitt Poul Rustin á restautrant Muntra á matr. nr. 494 í Fuglafirði. (8-0. Blankt atkvøddi Sigurð S. Simonsen).

Hetta er tó treytað av, at virksemi og bygningur verða góðkend av teimum pørtum, sum fingið hava umsóknina til ummælis. Hesir eru: Brunaumsjón landsins, Heilsufrøðisliga starvsstovan og Politiið í Runavík.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.50.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Bjørghild Arnholdtsdóttir

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen